## Skeið í grundleggjandi PLC-teknik, EFU nr. E0147

Tekniski Skúlin Klaksvík

Skeiðið er ætlað elektrikkarum, maskinmeistarum o.ø. Skeiðið gevur luttakaranum eina grundleggjandi vitan og møguleika fyri at koma ígongd við PLC-stýringar.

**Tíð**
1 vika, 8.-12. mars 2004, 5 dagar, 37 undirvísingartímar.

**Endamál**
Luttakarin kann – á elektrikkarastigi – greiða frá hvar og hvussu PLC-skipanir virka. Hartil er luttakarin førur fyri at seta upp, leggja inn, seta ígongd og forrita smærri industriellar PLC-skipanir. Umframt verður luttakarin førur fyri at forrita broytingar í verandi skipanum.

**Innihald**
Innleiðsla, Alment um PLC-skipanir, Virkisháttur, Diagram og forriting, Uppseting og innlegging.

**Undirvísari**
Åge Thordal Mortensen, Skive Tekniske Skole.

**Kostnaður**
Kr. 5.500,- Møguleiki er fyri at søkja um fullan ella partvísan stuðul sambært reglugerð um **»Stuðul til eftirútbúgving av yrkislærdum«.**

**Stað**
El-deildin á Tekniska Skúla í Klaksvík

**Freist**
Seinasta freist at boða frá luttøku er 27. februar – á telefon nr. 45 63 11 ella telefax 45 73 11.

## Grundstykkir í Funningsfirði

Við hesum verða trý grundstykkir í góðum byggilendi í Funningsfirði lýst til sølu.

Støddː uml. 500 $m^2$
Prísur: kr. 15.000,00

Nærri upplýsingar fáast frá borgarstjóranum á tlf. 441348 ella 223762.

**Elduvíkar kommuna**
tlf. 441348

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Landsins største úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

Beinleiðis frá framleiðara

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

# HALDIÐ SOSIALIN



**400,-** um ársfjórðingin
- sparið **380,-**
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

**Sosialurin**
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Ókeypis
Verður sent óporstað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn



## Sky digital

**4.995,-**

- Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.
- Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital
- Sjálvandi tann tryggasta loysnin



Góðska á hægsta støði, hevur eitt navn!
Spyr sjálvandi eftir

ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR



## Gerið kvettið:
**1 Echostar boks og 1 skermur**

Við í prísinum eru:
- 10 rásir frá BBC
- 4 andaligar rásir
- 1 barnarás
- 2 filmrásir
- 3 tíðindarásir
- og fleiri aðrar

Fyri einans
**2.995,-**

Allar eru gjaldsfríar rásir

Dragon modulir, ið kenna næstan alt, eru nú aftur at fáa fyri kr. 1.500,-

Alt til parabol og sjónvarp nú á goymslu, so sum motorar modulir og mangt annað

Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tel 42 14 11 ella 21 53 28




Nógv onnur góð tilboð á www.bio.fo/skyinterline

**VIT GERA ALT URTAGARÐSARBEIÐI**

Fa Urtagarðsrøkt
tel 32 71 31 - 28 39 53

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skrivari



**Ráðhúsið**

Stjórar kommununnar, tað er borgarstjórin, kommunustjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin, fara í næstum allir at húsast í Ráðhúsinum.

Í hesum sambandi er eitt felags sekretariat og móttøka gjørd í ráðhúsinum, ið umsøkjarin verður partur av.

Hinar deildirnar í Ráðhúsinum eru mentamáladeildin og starvsfólkadeildin.

Tórshavnar kommuna er uppbygd við trimum fyrisitingum: trivnaðarfyrisiting, tekniskari fyrisiting og miðfyrisiting.

Hjá Tórshavnar kommunu starvast umleið 1000 løntakarar, ið taka sær av ymisku kommunalu uppgávunum.

Tórshavnar kommuna, fevnir um Tórshavn, Hoyvík, Argir, Kolla-fjørð, Kaldbak, Hvítanes, Norðradal og Syðradal.

Í kommununi búgva 18.000 borgarar.

www.torshavn.fo

Av tí at skrivarin hjá borgar- og kommunustjóranum hevur tikið við nýggjum avbjóðingum, verður søkt eftir fólki til hetta spennandi, fjølbroytta og ábyrgdarfulla starv.

**Starvið**
er ein partur av sekretariatinum hjá stjórum kommununnar, har fyribils trý fólk fara at starvast. Skrivararnir hava egin ábyrgdarøki, men skulu samstarva og avloysa hvønn annan eftir tørvi.

Í stuttum kann sigast at starvið er:
- **Spennandi**, tí tú fært eitt sera gott innlit í hvat fyriferst í kommununi og "ferðast" millum hægstu embætismenn hjá kommununi. Tú luttekur sum skrivari á ymiskum fundum og ert við til at skriva skriv til borgarar og almennar myndugleikar.
- **Fjølbroytt**, tí tú starvast í móttøkuni hjá borgar- og kommunustjóranum, har nógvar ymiskar uppgávur eru. Eitt nú samskiftir tú og tekur ímóti viðskiftafólkum teirra, eisini fyrireikar tú fundir og móttøkur.
- **Ábyrgdarfult** tí í starvinum eru nógvar lógir, reglugerðir, mannagondir og deadlines, ið skulu yvirhaldast. Eisini skrivar tú fundarfrágreiðingar.

Omanfyri standandi er bert ein lítil partur av starvinum. Restina tosa vit um við eina møguliga setanarsamrøðu, ið ætlandi verða hildnar í viku 12 2004.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving. Harumframt ynskist prógv á merkonomstøði innan viðkomandi øki, t.d. fyrisitingarrætt. Um ikki, so ber til at taka hetta aftaná setan.

Neyðugt er at duga væl at málbera seg, bæði munnliga og skrivliga, á føroyskum og donskum. Harumframt er neyðugt at duga enskt.

Neyðugt er at hava góðan KT-førleika, tí stórur partur av samskifti, planlegging og kunning kommununnar verður gjørt við mail (Outlook) og interneti. Neyðugt er at hava koyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at tú ert røkin, dugir væl at leggja til rættis, ert fyrikomandi, kanst arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

Neyðugt er eisini at tú kanst arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð og kanst luttaka á fundum bæði uttanbýggja og uttanlanda.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 10. mars 2004. Viðmerk á umsóknina "skrivari".

## Bingjupláss í Vági

Frá og við mánadegi 23. februar 2004 eru upplatingartíðirnar á bingjuplássinum í Vági hesar.

| Dagur | Upplatingartíðir |
|---|---|
| Mánadag | Frá kl. 14.00-18.00 |
| Týsdag | Stongt |
| Mikudag | Frá kl. 14.00-18.00 |
| Hósdag | Frá kl. 14.00-18.00 |
| Fríggjadag | Frá kl. 14.00-20.00 |
| Leygardag | Frá kl. 14.00-19.00 |

Í nevndu tíðarskeiðum er eftirlitsfólk á bingjuplássinum og skipar fyri, hvar ruskið skal beinast.

**Vágs Býráð**
**Teniska nevnd**

## GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

## Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

## Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno** SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045